# Vit mugu hava nakað at

**– Eitt nýtt skip hevði kostað 30 milliónir at bygt, men nú hava vit fingið eitt spildurnýtt skip fyri ein fjórðing av prísinum. Vit mugu hava nakað at bjóða fólki og tað hava vit fingið nú, sigur Marner Lisberg**




*Hoyvíkingur fekk eina móttøku sum eitt nýbygningur, tá ið hann flaggskrýddur stevndi inn á Tvøroyri í gjárkvøldið. Og tað er ikki nógv galið, tí nú er bara sjálvur skrokkurin eftir av tí gamla skipinum*

NÝTT GAMALT SKIP

*ÁkiBertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú eru allir møguleikar fyri at hetta verður eitt av teimum góðu skipunum í flotanum.

Hetta var niðurstøðan hjá Marner Lisberg, eftir at hann hevði verið runt á Hoyvíkingi og hugt.

Hoyvíkingur hevur verið burtur í næstan eitt heilt ár, har hann er umvældur í botn og gjørdur av nýggjum.

So hóast pappírini siga, at skipið er 46 ára gamal, var í veruleikanum talan um eitt spildurnýtt skip, sum flaggskrýtt stevndi inn eftir Trongisvágsfirði seinnapartin í gjár.

Og hann fekk eisini eina móttøku, sum sømdi seg einum nýggjum skipið, táið hann stevndi flaggskrýddur inn á fjørðin. Nógv fólk varð komið saman á bryggjuni og hóast illfýsið veður, møtir hornorkestrið trúliga upp tá ið merkisdagar eru

## Alt spildurnýtt

Tað er nú meiri enn eitt ár síðani, at Hoyvíkingur varð sendur til Litava til umvælingar og har varð hann tikin í botn.

– Nú er tað bara sjálvur skrokkurin sum er eftir av upprunaliga skipinum. Alt hitt er nýtt, sigur Marner Lisberg, reiðari.

Men hann sigur, at hetta var eitt neyðugt stig at taka.

– Hoyvíkingur varð bygdur í 1960 og umstøðurnar umborð vóru ikki av slíkum slagi, sum vit kunnu bjóða eini skipsmanning nú á døgum, sigur hann.

Hann nevnir sum dømi, at tað var bara eitt wc og ein brúsa umborð til alla manningina og slíkar umstøður ber ikki til at bjóða fólki.

Hann sigur, at kappingin um sjófólkið er stór og skal eitt skip standa seg í kappingini og fáa fólk, er tað neyðugt at manningin hevur góðar umstøður umborð.

Og Marner Lisberg sigur, at tað hevur manningin fingið nú.

Hann sigur, at hesa tíðina, Hóyvíkingur hevur verið í Litava, er allur yvirbygningurin skorin omanav.

Bæði hekkan og síðurnar eru lagdar út og tað hevur gjørt skipið eitt sindur størri. Nýggjur motur er settur í hann og øll manningarrúmini eru nýggj og manningin hevur fingið fleiri wc. Lastin er gjørd eitt sindur størri, nýggj verksmiðja er sett í og stýrhúsið er nýtt. Ella stutt sagt, so er alt gjørt av nýggjum, so tað er bara skrokkurin eftir av upprunaliga skipinum.

Motorurin er 525 hestar og hann lastar 1000 kassar.

Tað vera 14 mans við skipinum.

– Samstundis er skrokkurin kannaður og hann er eisini í sera góðum standi og er sum nýggjur.

Alt hetta ger, at Hoyvíkingur er í dag klassaður sum eitt nýtt skip, sigur reiðarin, og hann heldur, at teir hava fingið nógv fyri íløguna.

## Allir møguleikar til staðar

Hann sigur, at nú hevur Hoyvíkingur eisini allar møguleikar fyri at vera eitt av teimum góðu skipunum í flotanum.

– Vit seta stórar vónir til skipið nú og verður fiskarí og prísir eftir vild, skuldi hann havt allar møguleikar.

Marner Lisberg sigur, at gongst sum ætlað, fer Hoyvíkingur at fiska fyri eina góða millión um mánaðin og tað heldur hann at øll útlit eru fyri. Men hvar hann fer at avreiða, veldst nógv um prís.



*Trý ættarlið á brúnni á Hoyvíkingi. Í miðjuni er Jóin Ellingsgaard, skipari, vinstrumegin er sonur hansara, Rói og høgrumegin stendur pápi hansara, Eivind*



*Eisini hjá Torbirni, pápa reiðaran, var hetta ein stórur dagur*